# Hvat skulu milliónirnar brúkast til?

**Løgmaður sigur, at landsstýrið nú má taka spurningin upp um, hvat peningurin í almennum grunnum skal brúkast til**

ALMENNIR GRUNNAR
Àki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

Hvat skal peningurin í Føroyagrunninum og Framtaksgrunninum brúkast til?

Tað er ein áhugaverdur spurningur, sum nú verður reistur í politiska kjakinum.

Og sjálvur setti Jóannes Eidesgaard, løgmaður, hol á kjakið í Ólavsøkurøðu síni.

Har avdúkaði hann, at landsstýrið heldur, at peningurin í framtaksgrunninum skal brúkast sum tolin og váðafúsur kapitalur til nýggjar vinnuætlanir.

– Landsstýrið fer at virka fyri at broyta viðtøkurnar hjá Framtaksgrunninum, so at grunnurin oftari enn nú leggur seg eftir at gera íløgur í nýtt virksemi við tolnum og váðafúsum kapitali, segði løgmaður.

Men hann vísir á, at ein annar grunnur, sum eisini hevur fingið nógvan pening, er Føroyagrunnurin og tað er eisini ein spurningur, hvat tann peningurin skal brúkast til. Ì tí sambandi vísir hann til tað, sum formaðurin í Búskaparráðnum, Johnny í Grótinum skjýtur upp.

Hann skjytur upp at brúka peningin í Føroyagrunninum til útbúgving.

– Grunnurin átti at nýtt peningin til at stuðla útbúgving. Ein frálíkur máti kundi verið at umskúla stóran part av flakafólkinum, sum eru hótt av arbeiðsloysi, heldur Johnny í Grótinum.

Hetta er heilt avgjørt eitt gott hugskot, sum eigur at verða viðgjørt við teirri virðing, sum eitt frálíkt hugskot eigur, heldur løgmaður.

– Tað er onki at ivast í, at útbúgvingar eru sera týdningarmiklar og at tær hava stóran tørv á pengum.



*– Føroyagrunnurin eigur at umhugsa at broyta viðtøkurnar, heldur Jóannes Eidesgaard, løgmaður*

## Brúk fyri vágafúsum pengum

Men Jóannes Eidesgaard staðfestir, at Føroyagrunnurin er ein vinnugrunnur og tí er tað eisini natúrligt um grunnurin onkusvegna er uppi í vinnulívinum.

– Aðrastaðni er vanligt at hava grunnar, sum hava til endamáls at seta vágafúsan kapital í nýggjar vinnuligar ætlanir sum eitt slag av íverksetarastuðuli.

Tað heldur løgmaður hevur manglað í Føroyum í ólukkumát, tí vinnuspírar, sum hava arbeitt við nýggjum ætlanum, noyðast at brúka alt ov stóra orku uppá at útvega fígging heldur enn til vørumenning og framleiðslu. Tí haldi eg, at tað er umráðandi at hava grunnar, har peningurin var eitt sindur fágafúsari í sambandi við nýggjar verkætlanir, enn vanligu peningastovnarnir eru.

## Umhugsa at broyta viðtøkurnar

Annars heldur løgmaður ikki at tað er rætt skilt, tá ið sagt verður, at Føroyagrunnurin hevur serligar skyldur mótvegis Norðoyggjum.

– Endamálið hjá grunninum er at eiga partapening í JFK. Men tá ið hann nú selur síni partabrøv í fyritøkuni, tulki eg tað sum um eina stig at koma sær burturúr tí vinnuliga virkseminum.

Tí heldur løgmaður, at teir eru komnir eitt sindur í stríð við sínar egnu viðtøkur og tí heldur hann eisini, at nevndin fyri grunnin eigur at umhugsa at broyta viðtøkurnar.

Annars kann avkastið av peninginum í grunninum brúkast útbúgving og gransking, men tað kann eisini brúkast til vinnulig endamál av ymsum slagi og tað er onki sum forðar grunninum at seta pening í vinnuligar ætlanir allastaðni í landinum.

Men tá ið summi stúra fyri, at at grunnurin mest fer at hugsa um Norðoyggjar, er tað tí, at norðoyggjar eru so væl umboðaðar í nevndini.

Men tað er eisini ein orsøk afturat til at nevndin eigur at umhugsa at broyta viðtøkurnar, heldur løgmaður.

Kortini ásannar hann, at hetta eru viðurskifti, sum landsstýrið ikki hevur so stóra ávirkan á. Tað eru viðtøkurnar fyri grunnarnar, sum gera tað av, og tað eru bara grunnarnir sjálvir, sum kunnu broyta viðtøkurnar.

– Men eg haldi, at landsstýrið hevur fullan rætt til at hava eina hugsan um, hvat peningurin í grunninum skal brúkast til og tað haldi eg eisini, at landsstýrið bæði hevur rætt til og eigur at hava, sigur Jóannes Eidesgaard.

# Einskiljingar endaðar í ruðuleika

**– Nú Føroyagrunnurin hevur selt JFK-Trol, kunnu aðrar einskiljingar enda í ruðuleika, heldur Signar Heinesen, verkfrøðingur**

EINSKILJINGAR
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

– Nú stórar, almennar fyritøkur skulu einskiljast, er tað greitt, at vit hava ruðuleika á økinum.

Tað heldur Signar Heinesen, verkfrøðingur og viðmerkjari.

Hann sigur, at hetta er avleiðingin av tí, sum er farið fram, nú Hanus Hansen og Norðoya Sparikassi hava keypt JFK-Trol frá Føroyagrunninum.

Hann vísir á, at Føroyagrunnurin hevur nakrar reglar at halda seg til. Og tær eru, at hann hevur serligar skyldur mótvegis Norðoyggjunum.

– Hinvegin hevur Landsstýrið boðað frá, hvussu farast skal fram, tá ið almennar fyritøkur skulu einskiljast.

Og leiðreglarnar hjá landsstýrinum siga, at almennar ognir skulu bjóðast út alment og at tað skal standa øllum í boði at bjóða, eisini útlendingum.

– Sostatt kann staðfestast, at endamálið hjá almenna Føroyagrunninum og leiðreglarnar hjá landsstýrinum, eru beinleiðis í stríð við hvørt annað, sigur verkfrøðingurin.

Hann sigur, at hetta er meiningsleyst og er eitt dømi um, at tað er okkurt í skipanini, sum ikki virkar.

Men, hvussu tað skal loysast, veit hann ikki, tí tað er neyvan nøkur løtt loysn.

– Tað einasta, vit vita, er, at í løtuni er ruðuleiki á økinum og at tað er onki sum bendir á, at hesin ruðuleikin ikki fer at standa við, tá ið aðrar fyritøkur skulu einskiljast, tí spurningin er, hvussu framferðin verður tá.

– Tað er eisini ein veruleiki, at tann, sum hevur gjørt almennu leiðreglurnar fyri einskiljingunum, hevur ikki megnað at fáa teori, veruleika og úrslit at sampakka, heldur hann.



*– Tann, sum hevur gjørt almennu leiðreglurnar fyri einskiljingunum, hevur ikki megnað at fáa teori, veruleika og úrslit at sampakka, heldur Signar Heinesen*

## Eitt skot fyri bógvin

Hann sigur, at verður hugsað um endamálið hjá Føroyagrunninum burturav, er tað óivað ein skilagóð avgerð at selja norðoyingum JFK-Trol-sjálvandi treytað av, at keypararnir eru veruligir og ikki ørindasveinar hjá fremmandum áhugamálum.

Signar Heinesen leggur í hesum sambandi stóran dent á, at hann hevur onga orsøk at halda, at keypararnir eru ørindasveinar hjá fremmandum áhugamálum og hann kennir bara formannin í nevndini fyri Føroyagrunnin sum ein álitismann.

– Hinvegin legði løgmaður seg at sova eitt kvøldið í farnu viku í vissuni um, at ein leistur varð lagdur fyri, hvussu einskiljingarnar skuldu fara fram. Men tá ið hann vaknaði aftur morgunin eftir, hevði hann mist bæði flakavirki, trolarar og aðrar ognir hjá JFK-Trol.

Signar Heinesen heldur, at hetta mátti verið ein løgin kensla hjá løgmanni.

– Tað er ikki bara einskiljingartilgongdin, sum hevur fingið eitt álvarsligt skot fyri bógvin. Sjálvt grundarlagið undir landsins stjórn hevur eisini fingið eitt skot fyri bógvin, tí tað kann ikki bera til, at løgmaður skal kunna vakna um morgunin og ásanna, at hann hevur mist ovurstórar ognir, uttan at hann veit av tí.

Signar Heinesen sigur, at slíkt er ikki serliga álitisvekjandi hjá Føroya Fólki, tí nú er tað ein spurningur, hvør tað er sum ræður í Føroyum.

– Tað er gamaní at nevndirnar í grunninum skulu hava fult frælsi og at politikarar skulu ikki blanda seg uppí. Men tá ið landsins stýri ger nakrar leiðreglur á einum ávísum øki, eigur ikki at vera nakar sum helst ivi um, at tær verða fylgdar, hvørki av tí privatu vinnuni ella av almennum nevndum, tí ongin ger ímóti landsins stýri.

– Men kortini eru tær ikki fylgdar í hesum føri, og tað er ein trupulleiki hjá landsstýrinum, sigur Signar Heinesen.